# Kjak



**Levi Mørk**
*býráðslimur*

## Børnini í Holbæk lærdu meg »at brúka peruna«

*Tað frøir meg, at Tórshavnar kommuna er farin undir tiltakið, "Brúka Peruna", sum er ein miðvís ætlan um at fara undir ein vælskipaðan orkupolitikk fyri allar stovnar hjá kommununi*

Endamálið er m.a., at allir kommunalir stovnar skulu spara 10 prosent av streymi, kolvetni og fjarhita fyri eitt rakstrarár.

Hetta framúr góða orkuátak hjá Tórshavnar kommunu er byrjað í ár. Tey fyrstu úrslitini vera avdúkað fyrst í komandi viku, har 3 teir fremstu stovnar hjá Tórshavnar kommunu fáa handað heiðursgávu frá Heilsu- og Umhvørvisdeildini, fyri teirra sparing fyri januar 2010.

Hetta tiltakið hjá Tórshavnar kommunu fekk meg at hugsa aftur á árið 1998, tá ið eg var í starvsvenjing á "Holbæk Fritidscenter" í Holbæk.

Eg skrivaði í 2008 grein um hesa mína fyrstu uppliving um, at "Grønur politikkur skal raðfestast høgt" - og at vit eiga at læra um grønan atburð í gerandisdegnum frá barnsbeini av.

### Holbæk Fritidscenter í 1998

Á "Holbæk Fritidscenter" bleiv eg tá í 1998 sera bilsin um, at børnini har vóru vón at skilja ruskið, og at tey tóku tað sum eina sjálvfylgju.

Reglur vóru á frítíðarskúlanum, sum skuldu tryggja, at ein "grønur politikkur" var framdur í verki á øllum økjum á stovninum.

Eg kann nevna sum dømi, at børnini høvdu ikki loyvi til at hava breyð í pakkum við silvurpappíri.

Tað var álagt starvsfólkunum at læra børnini at skilja rusk, at eta grønt, spara vatn, hita og streym. Eisini var farið uundir eina miðvísa upplæring í endurnýtslu.

Fyri mær var hesin grøni politikkur so at siga ókendur. Sjálvandi var eg sum heild vitandi um "grønan politikk", men tað var á einum ógvuliga yvirskipaðum stigi, sum ikki hevði nakran týdning í gerandisdegnum.

Men her á frítíðarskúlanum lærdi eg skjótt mannagongdir í gerandisdegnum um, hvussu stovnurin kundi spara og minka um óneyðugt oyðsl. Og var eg í ivi, hvussu eg skuldi gera teir fyrstu dagarnar, ja, so fekk eg góða vegleiðing frá børnunum.

Tey mintu meg ofta á, at eg skuldi sløkkja ljósið, um tendrað var í einum rúmi, sum ikki varð nýtt til nakað ein part av degnum.

### Gularótin og námsætlan

Holbæk kommuna lokkaði við eini "gularót" stovnarnar í kommununi at seta tann grøna politikkin í verk á øllum økjum, har tað var møguligt.

Gularótin - ja, hon var handað hvønn mánað og hvørt ár til tann stovnin, sum var fremstur í at seta í verk henda grøna politikkin.

Og gularótin var eitt heiðursbræv og gávur til tríggjar tey fremstu stovnarnar á hesum økinum.Tann grøni politikkurin var ein samantvinnaður partur av námsætlanini hjá frítíðarskúlanum í Holbæk.

### Umhvørvisvikan í Hoyvíkar skúla

Vit hava eisini stovnar í Tórshavnar kommunu, sum eru at meta sum undangongustovnar á ávísum grønum økjum.

Eg hugsi m.a. um Hoyvíkar skúla, sum hevur eina "Umhvørvisviku", har ið børnini verða lærd um "grønan politikk".

Og tað er sera gleðiligt at vita, at foreldur og - ikki minst - børnini hava tikið sera væl undir við hesi umhvørvisviku líka frá byrjan av.

Men vit í Tórshavnar kommunu hava nú rættiliga nógv eftir at læra um grønan politikk í gerandisdegnum.

Men tað skal vera mín vón, at tiltakið - "Brúka peruna" - veruliga fer at seta ferð á ein miðvísan grønan politikk á øllum stovnum í Tórshavnar kommunu.

### Ein greiðan grønan politikk

Vit skulu hava ein sjónligan almennan politikk í Tórshavnar kommunu, sum stovnarnir hvør sær laga til síni egnu viðurskifti, alt eftir tí, teir takast við.

Tann almenni grøni politikkurin eigur m.a. at verða greitt orðaður í nakrar grundleggjandi almennenar leiðreglur, sum stovnarnir síðan - hvør í sínum lagi - taka til umrøðu og viðgerðar - møguliga eina tvær ferðir um árið við fylgjandi eftirmetingum av úrslitum.

### Tórshavn gongur undan

Eg eri sera fegin um, at Tórshavnar kommuna gongur undan á umhvørvisøkinum í sínum kommunalpolitikki.

Í Tórshavnar kommunu verður tað Heilsu- og Umhvørvisnevndin, sum serliga fer at vara av hesum grøna politikkinum.

Men tað er mín vón, at allir býráðspolitikkarar, antin teir eru í samgongu ella andstøðu, fara at taka lógvatak saman um at fáa framt og ment grøna politikkin hvønn dag í árinum - øll ár fram!

**Guðrun Holm Jacobsen og**
**Elin Sofía á Tjaldrafløtti Vestergaard**

## Føroyar má gerast ein pull-faktorur

*Vit bjóða hægsta skattatrýst í heiminum, høgar matvøruprísir, javnan samgonguslit og skjótan og effektivan fíggjarpolitikk - har løgtinglimirnir bert fáa 45 minuttir at góðtaka fíggjarlógir*

Eisini fáast ókeypir soppar á flestu almennu stovnum, og um tú kemur heim aftur úr einum evropeiskum stórbýi eftir loknan lesnað, so er tað mest sannlíkt, at tú í framtíðini verður sendur til eksotisku oynna fyri sunnan. Umframt hetta kunnu vit veita trygd fyri, at tú sleppur á limalistan hjá Kringvarpinum og at 50% av tínum vinfólki, ið eru lesandi uttanlands, aldri venda nøsini heim aftur til tín. Vælkomin til Føroyar.

Hóast tølini í kanningini hjá Norðuratlantsbólkinum um føroyingar í Danmark vóru alarmerandi, so tykist hon als ikki at fáa føroyingar upp úr stólinum. Kanningin setti tó dám á nakrar kjaksendingar, men best var at stinga høvdið niður í jørðina og vóna, at alt nokk fór at 'laga seg'.

Í kanningini varð m. a. spurt um framtíðar bústaðarætlanir hjá teimum luttakandi. Bert 22% svaraðu, at tey ætlaðu sær heilt vist at flyta aftur til Føroyar at búgva, 18% vóru í iva, meðan yvir helvtin, 53%, høvdu als ikki ætlanir um at flyta heim aftur til Føroya. Harvið vísir kanningin greitt, at fólkaflyting ikki verður ein trupulleiki í framtíðini, men longu er ein trupulleiki. Í innleiðsluni til hesa grein varð víst á nakrar av teimum mongu push-faktorunum, ið gera seg galdandi í føroyska samfelagnum. Føroyar hevur tó eisini pull-faktorar, ið gera, at fólk tíma at flyta aftur til Føroya. Familjusambondini eru av stórum týdningi, men sambært kanningini, so er hesin pullfaktorurin longu nú vorðin ov veikur at draga føroyingar uttanlands heim aftur. Harvið tykist tað vera greitt, at skal fólkatalið í framtíðini vaksa í Føroyum, mugu vit skapa pullfaktorar, ið kunnu draga ungu føroyingarnir heim aftur eftir loknan lesna.

### Útjaðarin Føroyar

Innanhýsis stríðið í Føroyum tykist uppá mangar mátar at køva visjónirnar fyri einum framkomnum landi, ið er áhugavert hjá føroyingum at búgva í, men eisini hjá føroyingum uttanlands at koma heim aftur til. Politiska síðan av málinum snýr seg í høvuðsheitum um útjaðara- og miðstaðarpolitikk. Men sambært kanningini hjá Norðuratlantsbólkium, so tykist trupulleikin ikki at vera eitt stríð millum útjaðara og miðstað í Føroyum, men Føroyar sum útjaðara í globala heimssamfelagnum. Føroyar eru í beinleiðis kapping við aðrar stórbýir í Evropa, og sambært kanningini, so tapa vit so dyggiliga.

Havast má í huga, at føroyingarnir, ið venda aftur til Føroyar, í stóran mun hava búð í stórbýum, ið hava nógv fleiri arbeiðsmøguleikar og nógv fleiri frítíðartilboð enn Føroyar hevur. Føroyar má royna at bjóða somu arbeiðs-og frítíðartilboð sum aðrir miðstaðir, hóast tað er í minni vavi. Av tí at Føroyar eru so lítlar, so ber hetta bert til, um ymisku økini í Føroyum semjast um eina eind, og ikki lata lokalstríðið vera dominerandi kraftin í samfelagnum. Orðið, miðsavning, verður av mongum sæð sum ein vanlukka, men kann enda við at vera bjargingin fyri útjaðaran, Føroyar. Ein miðsavning av arbeiðsplássum og frítíðartilboðum hevði ført við sær nógv fleiri møguleikar fyri einstaklingin, og hevði harvið kunna skapa fleiri og sterkari pullfaktorar, enn ymisku økini høvdu kunnað skapt hvør sær.

Stuttu frástøðurnar í Føroyum gera tað púra høpisleyst at tosa um miðstað og útjaðara. Skal Føroyar í framtíðini hava nakran møguleika at kappast við útheimin um føroyska ungdómin, er neyðugt, at lokalstríðini ikki fáa pettað Føroyar sundur í enn smærri eindir. Kappingin eigur heldur at vera úteftir. Týdningarmiklasta vøran í tænastu- og vitanarsamfelagnum er vitan, eisini nevndur humanur kapitalur. Fáa vit ikki vitanina heim aftur til Føroyar, kann hetta fáa álvarsligar avleiðingar fyri búskapin, og harvið eisini teir møguleikar eitt samfelag fær bjóða føroyingum í framtíðini. Missa vit í framtíðini meir enn helvtina av teimum, ið eitt nú fara til Danmarkar at lesa, kann hetta í ringasta føri enda við, at Føroyar um eina hálva øld ber eyðkenni av at vera eitt pensiónistaland.

Pullfaktor her:
Ymiskir samfelagsfaktorar, ið kunnu draga føroyingar aftur til Føroya

Pushfaktor her:
Ymiskir samfelagsfaktorar, ið kunnu virka til at føroyingar ikki koma aftur til Føroya